# Ársfrágreiðing

# 2020



# Ársfrágreiðing 2020

Her verður í stuttum greitt frá virkseminum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í 2020. Árið gjørdist nógv øðrvísi enn ætlað hjá okkum øllum. Sum hjá so mongum, myndaði korona eisini arbeiðið hjá RFF. Men tað var ikki bara neiligt. Tíbetur náddu vit at hava ferðsludagarnar fyri landsins 8. flokkum, áðrenn korona kom til landið, men onnur tiltøk vórðu treyðugt so avlýst, ella útsett. Í staðin fingu vit høvi til at fremja okkurt tiltak, sum annars ikki var raðfest.

## Ongin læt lív í ferðsluni í 2020

Fyri aðru ferð í nýggjari tíð, doyði ongin í ferðsluni á føroysku vegunum. Fyrru ferð var í 2018 og tað var ein so stór hending, at vit skulu heilt aftur til 1967, fyri at finna eitt álmanakkaár, har vit ikki mistu fólk í ferðsluni í Føroyum.

Hóast tað framhaldandi henda ferðsluóhapp við fólkaskaða, vísa tey lágu tølini at áhaldandi og miðvísa arbeiðið at betra um ferðslutrygdina gevur úrslit.

Um hugt verður eftir tali av óhappum við fólkaskaða seinnu árini, síggja vit tó ikki somu jaligu gongd. Hetta talið er nevniliga ikki broytt munandi tey síðstu 10 árini, men hevur ligið á uml. 30-35 hvørt ár. Um aldarskiftið var hetta talið annars tvífalt so stórt. Og tað hendi ein stór broyting, millum annað tá promillumarkið varð broytt. Men síðani hevur talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða verið á leið tað sama.

0-hugsjónin sigur tó, at ongin skal doyggja ella fáa varandi mein í ferðsluni í Føroyum. Tí má annað og meira til, fyri at fáa talið av óhappum við fólkaskaða enn longur niður.

Eins og undanfarin ár samanbera vit okkum við nærmastu grannalond okkara. Har síggja vit, at enn er nakað eftir á mál, skulu vit náa eins góðum ferðslutølum og eitt nú Noreg, sum seinnu árini hevur havt bestu úrslit av norðurlondunum. Av tí at Føroyar eru smáar og okkara hagtøl eru smá, kann ein álvarslig ferðsluvanlukka ávirka hagtølini ógvusliga. Vit hyggja tí vanliga eftir einum 5 ára miðaltali.

Tá vit samanbera okkum við hini norðurlondini, verða tølini brúkt við útgangsstøði í tal av deyðum í ferðsluni pr. 100.000 íbúgvar. Seinastu árini hava Føroyar ligið aftast samanborið við hini norðurlondini, men við lágu tølunum seinnu árini, liggja Føroyar ikki aftast. Úrslitið fyri 2020 er 2,3 deyð pr. 100.000 íbúgvar (5 ára miðal). Til samanberingar var hetta talið 2,7 í 2019.




Í talvuni omanfyri eru tølini samanborin við hini norðurlondini. Vit hava tíverri ikki fingið tøl frá øllum norðurlondunum enn. Tó at tølini fyri hini norðurlondini eru ikki endalig enn, verður boðað frá søguliga lágum tølum, millum annað í Noregi og í Danmark. Væntað verður, at korona-ávirkanin ger seg galdandi her, tí fólk hava ferðast nógv minni á vegunum í 2020. Neyðugt er at hava í huga, at Ísland, eins og Føroyar, hava smá hagtøl, og tí ávirka sveiggj í tølunum eisini serliga nógv. Tað ber kurvan eisini brá av.

## Ferðsluóhapp við fólkaskaða

Í 'Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2019–2027' er høvuðsmálið, at talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða skal vera 30% minni í 2027 við støði í tølum frá 2018. Hetta merkir nágreiniliga, at talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða skal í mesta lagi verða 21 óhapp í 2027.




Í 2020 skrásetti politiið 36 ferðsluóhapp við fólkaskaða. Av hesum var rúsdrekka, ella rúsevni/heiligvágur til staðar í 6 av hesum óhappum. 36 óhapp við fólkaskaða er eitt vet hægri enn í 2019, men tað er annars á hædd við gongdina tey seinastu tíggju árini.

Í mun til yvirskipaða málið í ferðslutrygdarætlanini, er hetta ikki ein nøktandi gongd. Fyri at røkka málinum í ferðslutrygdarætlanini má annað og meira til.

Sambært ferðslutrygdarætlanini eru fremstu tilmælini til at røkka málinum í 2027 millum annað, at ein skipað **skaðakanning** verður sett í verk av álvarsligum ferðsluóhappum, og at arbeitt verður miðvíst við at fáa til vega betri **hagtøl**.

# Landsfevnandi átøk í 2020

Hóast 2020 var eitt sera øðrvísi ár, var nógvur aktivitetur á ferðslutrygdarøkinum. Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í 2020 framt átøk viðvíkjandi lyktum, gáloysni, rúskoyring, skúlabyrjan, ferð og frástøðu, umframt árligu afturvendandi tiltøkini ferðsludagar fyri 8. flokkum, súkkluhjálmum og endurskinsvestum til yngstu skúlanæmingarnar. Og so fingu vit nýtt lív í tónleikin, sum í 80unum og 90unum varð útgivin til frama fyri ferðslutrygd. Nú er tilfarið tøkt talgilt á øllum talgildum pallum.

Til átakið um skúlabyrjan vóru kommunurnar aftur bodnar við og nógvar teirra tóku av. Vit ynskja at halda fram við samstarvinum við kommunurnar í tiltøkum og átøkum, har tað gevur góða meining. Hetta so at átøkini fáa størri slagmátt og røkka betur út í lokalu økini.

## Lyktaátak

Í 2020 høvdu vit lyktaátak í februar og aftur í oktober.

Átakið varð í fyrstu atløgu framt í samstarvi við Akstovuna, tá nakrar spurnarkanningar vóru deildar á sosialum miðlum. Við spurnarkanningunum royna vit á skemtiligan hátt at prika til uppmerksemið og virðingina fyri billyktunum. Nevniliga at ljósini eru tendrað, at kanna um perurnar lýsa og um lyktirnar eru rætt stillaðar. Rætt svar gevur eitt diplom sum 'Ljósatendrari'.




Á heysti, tá dagarnir aftur styttust, endurtóku vit átakið. Hesa ferð framleiddu vit spegilsskeltir, sum gera tað lætt hjá bilførarum at kanna sínar egnu lyktir. Vit gleðast um, at tað eydnaðist okkum at gera samstarv við Magn og Effo, um at seta spegilsskeltini við teirra viðskiftastøðir. Spegilsskelti eru á umleið helminginum av øllum viðskiftastøðum hjá Magn og Effo og í øllum økjum í landinum.

Fólk hava tikið væl ímóti átakinum og tað tykist vera sera relevant at minna fólk á at tendra lyktirnar og kanna perurnar, tí ógvuliga nógv reagera uppá átakið.

Á heimasíðu okkara (www.rff.fo) er hópin av kunning og góðum ráðum um billyktir.






**Ferð**

Í maj mánaða endurtóku vit ferðátakið "Halt hámarksferðina, ókey?", sum fyrstu ferð varð framt í oktober 2019. RFF samstarvar við Betri, Landsverk og Trygd um hetta átakið, sum skal fáa fólk at hugsa um avleiðingarnar við at koyra ov skjótt.

Boðskapurin í átakinum kom fram í filmi, sum varð vístur í Kringvarpinum, og á sosialum miðlum, umframt í sambandi við koronavinarligt uttandura-biograf tiltak.

Tað er ikki bara tú, sum verður rakt/ur av eini ferðsluvanlukku, men øll kringum teg verða eisini rakt. Filmurin setir orð á óhugnaliga tankan um, hvør skal siga einum eftirsitandi barni, at mamma ikki kemur heim aftur, tí hon koyrdi ov skjótt og var í eini ferðsluvanlukku. Tíbetur veit mamman í filminum betur, tí hon hevur lurtað eftir áheitanini um at halda hámarksferðina.




Eisini varð áminning um hámarksferðina endurmálað á landsvegir á útvaldum støðum kring landið. Støðini vóru útvald eftir fortreytunum at tað eru støð, har bilar koyra ov skjótt og á flestu støðunum hevur Landsverk eisini fastar teljistøðir.



Ov nógv ferð er ein stór avbjóðing fyri ferðslutrygdina. Ov nógv ferð økir um vandan fyri at óhapp henda og skaðarnir av ferðsluóhappum verða størri og ógvusligari, tess skjótari koyrt verður. Vit hava spurt føroyingar um teirra vanar í ferðsluni og tað sæst at aldur og royndir hava ávirkan á, hvussu skjótt vit koyra. Soleiðis sæst at yngri bilførarar hava lyndi til at koyra skjótari enn eldri, meiri royndir bilførarar.




Vit hava eisini kannað sambandið millum hugburðin til ferð og hvussu ofta fólk uppliva vandastøður í ferðsluni. Sambandið er hugvekjandi. Av teimum, sum vanliga siga seg koyra 100 km/t ella skjótari á landsvegi, hava 44 % verið tætt við at enda í einum ferðsluóhappi seinastu trý árini. Meðan 20% hava verið í einum ferðsluóhappi. Fyri tey, ið siga seg vanliga koyra 80km/t ella spakuligari á landsvegi eru hesi tølini ávikavíst 25% og 8%.





RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

**Frástøða**
At halda frástøðu eru eini boð, sum vit eftir hondini eru sera von at hoyra. Seinasta árið hava tilmælini til tess at steðga smittuspjaðing verið mong og lyklaorðið er 'frástøða'.

Men frástøða í ferðsluni er eisini eitt hugtak, sum vit settu sjóneykuna á í 2020. Saman við Landsverk mintu vit bilførarar á at halda frástøðu á vegnum. Tí heldur tú hóskandi frástøðu, hevur tú stundir at umráða teg, um bilurin framman fyri teg brádliga bremsar. Og tað kann verða munurin á lívi og deyða.

Við boðskapinum 'Halt frástøðu – eisini á vegnum' vóru pílar málaðir á ein landsvegateig millum Sandvíkarhjalla og Sund. Eisini vóru útvarps- og vevlýsingar við somu áminning um, at halda 45 m frástøðu til bilin frammanfyri. Tí tá hevur tú 2 sekund at umráða teg í, um bilurin framman fyri brádliga bremsar, koyrir tú 80 km/t.

Teinurin, sum varð merktur við frástøðu-pílum er ein teinur, har lutfalsliga nógv óhapp henda við bilum, sum renna á aftanífrá.




Tað kann vera torført at meta um, hvat hóskandi frástøða er á vegnum. Neyðugt skal ikki vera at nýta nógva orku at rokna teg fram til tað, meðan tú koyrir bil, tí so tekur tað uppmerksemi í koyristøðuni.

Vit hava tí savnað nakrar tummilsreglur fyri hvussu tú lættliga kann meta um røttu frástøðuna.

- **Tel upp í tvey:** Vel eitt merki fram við vegnum frammanfyri teg at telja eftir. Til dømis byrjanin av bilverjuni, ein pela, ella okkurt annað støðufast merkið. Byrja at telja, tá bilurin frammanfyri teg fer framvið merkinum og tel síðani 'eitt-túsund-og-eitt, eitt-túsund-og-tvey'. Telur tú til 1002, áðrenn tín bilur kemur til títt valda merkið, tá tú heldur hámarksferðina 80 km/t, ert tú tryggari.

- **Tel prestar:** Altso ikki teir, sum ganga í svørtum kjóla og hvítum kraga, men reyð- og gulmálaðu timburpelarnar við endurskinum, sum standa fram við landsvegum. Í Føroyum eru 'prestarnir' settir við nett 20 m frástøðu. Koyrir tú soleiðis at tað eru 3 prestar millum teg og bilin frammanfyri, tá tú heldur hámarksferðina 80 km/t, ert tú tryggari.
- **Tel hvítu brotnu miðlinjurnar:** Tær eru soleiðis háttaðar, at fyri hvørja brotna linju, við millumrúmi, eru 12 m. Hetta óansæð um talan er um vanligar koyrilinjur, ella longru ávaringarlinjurnar. Hevur tú 4 linjur millum teg og bilin frammanfyri, tá tú heldur hámarksferðina 80 km/t, ert tú tryggari.



**Kokkteylur uttan alkohol**

Í juni endurtóku vit góða samstarvið við Bláa Kross Føroya, um alkoholfríar drykkir at bjóða teimum, sum skulu koyra heim eftir veitslu. Aftur hesa ferð hevur kokkurin Gutti Winther gjørt eina leskiliga uppskrift, við íblástri í føroysku náttúruni. Drykkurin fekk navnið "Sýrutripp" og høvuðsinnihaldið eru sýrur, sum eru frískligar, vælsmakkandi og finnast í føroysku náttúruni. Saman við "Heilt appilsinfríur" (sum er kokkteylurin uttan alkohol frá 2019) er vónin at uppskriftirnar fara at leggjast afturat, so tað framyvir fer at vera ein sjálvsagdur partur av eini veitslu, eisini at hava alkoholfrí alternativ til gestirnar.

Uppskrift og mannagongd at gera tínar egnu "Heilt appilsinfríu" og "Sýrutripp" eru at finna á heimasíðu okkara.



**Skúlabyrjan**
Í august 2020, tá skúlarnir byrjaðu aftur, framdi RFF átak í samstarvi við kommunur, har bilførarar vórðu mintir á at ansa eftir skúlabørnunum við skúlarnar. Hetta við plakatum. Endamálið var at gera vart við, at í sambandi við skúlabyrjan eru aftur fleiri børn í ferðsluni, og eisini børn, sum kanska eru nýggj í ferðsluni og hartil smá og tískil ikki síggjast so væl.

Í nøkur ár hevur Ráðið fyri ferðslutrygd boðið kommununum at luttaka í átøkum og talið av kommunum, ið taka av hesum tilboði veksur fyri hvørja ferð. 16 kommunur vóru við í átakinum hesa ferð. Hesar eru: Eiðis -, Eystur -, Fuglafjarðar -, Hvalbiar -, Klaksvíkar -. Kvívíkar -, Porkeris -, Runavíkar -, Sjóvar -, Sunda -, Sørvágs -, Tórshavnar -, Tvøroyrar -, Vága -, Vágs – og Vestmanna kommuna.



**Gáloysni**



Í september 2020 framdu vit átak um gáloysni. Átakið við spurninginum ”Hvar eru tankarnir, tá tú koyrir bil” varð fyrstu ferð framt í januar 2018 og nýtt átak um gáloysni verður framleitt í 2021. Boðskapurin kom fram í filmi, sum var vístur í sjónvarpi, á alnótini, í miðlum og biografi. Eisini vóru útvarpslýsingar í øllum loftmiðlum.

Boðskaðurin í átakinum er greiður. Hvussu langt koyrir tú í blindum, um tú hyggur burtur frá vegnum í nøkur sekund. T.d. við at lesa sms-boð á telefonini. Koyr bil, tá tú koyrir bil.

Seinnu árini hava vit spurt føroyingar um teirra hugburð til nýtslu av handhildnari telefon, meðan koyrt verður. Parturin av fólki, sum siga seg ongantíð tosa í telefon, meðan tey koyra bil er 45% og er hetta talið lægri enn undanfarnu árini. Tey, sum siga seg gera hetta av og á, ella ofta/altíð er 21% og er hetta talið hægri enn seinnu árini.

Aldursbýtið vísir, at millum yngru bólkarnar er talið á teimum, sum av og á, ella ofta/altíð nýta handhildna fartelefon, meðan tey koyra, munandi hægri, enn millum eldru bilførarar.

Í aldursbólkinum upp til 29 ár, siga 29% seg brúka telefonina, meðan tey koyra av og á, ella ofta/altíð. Talið fyri tey 30-39 ára gomlu er 28%.


Atferð
Hvussu ofta
0% 10% 20% 30% 40% 50% 60% 70% 80% 90% 100%
...koyrir tú ávirkað/ur?
98%
...tosar tú í fartelefon uttan snigil ella headsett, ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari/koyrir?
45% 35% 14% 7%
...brúkar tú fartelefonina til lesa og senda sms, lesa/senda teldupost ella til spøl v.m. ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari?
72% 19% 7% 3%
...koyrir tú skjótari enn tað er loyvt?
11% 25% 36% 28%
Aldrin
Sjáldan
Av og á
Ofta/altíð
Veit ikki
LÓÐUR


Atferð
...tosar tú í fartelefon uttan snigil ella headsett, ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari/koyrir?
30% 25% 20% 15% 10% 5% 0%
15-29 ár: 18% 11%
30-39 ár: 15% 13%
40-49 ár: 22% 3%
50-59 ár: 13% 5%
60-75 ár: 3% 3%
Av og á
Ofta/altíð
...brúkar tú fartelefonina til lesa og senda sms, lesa/senda teldupost ella til spøl v.m. ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari?
30% 25% 20% 15% 10% 5% 0%
15-29 ár: 9% 5%
30-39 ár: 15% 6%
40-49 ár: 9% 0%
50-59 ár: 3% 2%
60-75 ár: 0% 1%
Av og á
Ofta/altíð
LÓÐUR

Men samstundis, sum fólk í alt ov stóran mun siga seg javnan tosa í handhildna fartelefon, meðan tey koyra bil, meta tey eisini at fartelefonin er ein tann fremsta orsøkin til, at fólk fáa skaða í ferðsluni. Bara ov nógv ferð, verður mett størri skaðaorsøk.




Lítið er at ivast í, at tørvurin á framhaldandi átøkum á hesum økinum eru ógvuliga týdningarmikil.

**Rúsátak**

Hóast hugburðurin til rúskoyring er munandi bøttur seinastu nógvu árini, og nógv tey flestu siga seg taka frástøðu til rúskoyring, henda framvegis ferðsluóhapp orsaka av rúskoyring. Tað er munur á hugburði og atburði. Og tí er framvegis týdningarmikið at fremja rúsátøk.

Saman við Trygd og Betri framleiddu vit nýtt rúsátak í 2020. Skipað varð fyri hugskotskapping millum ung, har vit bóðu um hugskot til hvussu vit kunnu steðga rúskoyring.









Úrslitið varð at Brynhild Nolsøe í Lágabø úr Vági vann við hugskotinum ”Eg koyri teg, tú koyrir meg”, sum byggir á grundarlagið at vit øll hava ábyrgd at tryggja, at øll koma trygt heim og at vit skiftast um at vera tann, sum koyrir.




Hugskotskappingin var gjøgnumførd í oktober/november og átakið varð framt í desember. Filmurin varð vístur í kringvarpinum, í biografi og á sosialum miðlum. Átakið verður endurtikið í 2021.

**Tá klassikarar gerast nútímans**
Minnist tú ‘Stýr tær’, ‘Turbo Petur’ og ‘Eitt forelskað par’? Hetta eru heitini á nøkrum av løgunum á tónleikaútgávunum, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd stóð fyri í 80- og 90-árunum.

Í 2020 lótu vit tónleikaútgávurnar í talgildan ham og gjørdu tær atkomuligar hjá einum nýggjum ættarliði. Í september 2020 vórðu tónleikaútgávurnar ‘Stýr tær’ og ‘Síðsta skríggj’ tøkar á øllum talgildum pallum.



Í 1987 gav Ráðið fyri Ferðslutrygd út kasettubandið 'Stýr tær'. Á bandinum vóru tíggju løg. Níggju teirra vóru kendir poppsangir, sum vóru væl dámdir millum tey ungu. Meðan nýskrivaði sangurin 'Stýr tær' varð gjørdur til høvið. Johannus á Rógvi Joensen og Martin Joensen gjørdu lagið, meðan Joka framførdi. Bandið fekk sera nógva spælitíð í útvarpinum, og heilt víst eisini á mongum biltúrum, har bandspælarin koyrdi við fullari styrki.

Júst tíggju ár seinni, í 1997, útgav RFF aftur tónleik við ferðslutryggum boðskapi. Kasettubandið var skift út við fløguna, sum í 90árunum var síðsta skríggj, og tað bleiv eisini navnið á útgávuni.

Á 'Síðsta skríggj' vóru 13 nýskrivaði løg. Uni Arge átti orðini, meðan Johannus á Rógvi Joensen stóð fyri tónleikinum. Karl Martin Samuelsen, Malan Eyðunsdóttir og Rókur Jákupsson Jacobsen eru nakrar av kendu røddunum á útgávuni.

Boðskapurin í sangunum er ferðslumentan í breiðari merking og siga eina søgu um biltúrar, at koyra skjótt, rúskoyring, at ansa sær, og um at missa í ferðsluni.

## Afturvendandi átøkini

### Ferðsludagar fyri 8. flokkum

Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri 8. flokkum á vári 2020 og vit vóru so heppin, at tiltakið varð gjøgnumført áðrenn fyrsti koronatilburðurin varð staðfestur í Føroyum.

Fyrstu ferðsludagar fóru av bakkastokki í 1998 og hava verið hildnir at kalla á hvørjum ári síðani. Hesi árini er tiltakið tillaga og dagført, men í høvuðsheitum er yvirskipaða málið tað sama - at læra um vandar í ferðsluni, avleiðingar av avgerðum okkara og tvístøðum um hvat kann gerast fyri at fyribyrgja og hvat er 'rætta' reaktiónin, tá skaðin er hendur. Tiltakið er samskipað av Ferðslutrygd og stuðlað av Trygd og Betri Trygging.










Í 2021 hava vit valt at útseta ferðsludagarnar orsaka av koronu. Teir vera tí í september, fyri somu næmingum, sum áttu at verið á ferðsludøgum í vár. Tá ganga tey í 9. flokki. Vónandi fer tiltakið at eydnast eins væl og tað hevur gjørt undanfarnu árini.




## 1-1-2 dagar

Seinnu árini hava 1-1-2 dagar verið skipaðir, har løgreglan, brandstøðin, sjúkraflutningstænastan og Ferðslutrygd møta elstu barnagarðsbørnunum. Orsaka av korona vóru tíverri ongir 1-1-2 dagar í 2020, men teir vera vónandi aftur í 2021.

**Súkkluhjálmar og endurskinsvestar til 1. floksnæmingar**
Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín súkkluhjálm. Hjálmarnir verða latnir í samstarvi við Betri og Trygd.

Eisini fáa teir yngstu næmingarnir (1. flokkur, ella forskúli) endurskinsvest frá Betri.

Her eru tað næmingar í 1. flokki í Sørvágs skúla, sum hava fingið hjálmar.





RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

## Annað virksemi í árinum, ið fór

### Nýggj heimasíða

Um ársskiftið 2020/2021 var arbeitt við nýggjari heimasíðu til Ráðið fyri Ferðslutrygd. Vaksandi krøv til trygd seta størri krøv til heimasíður og hetta var ein av orsøkunum til arbeiðið. Men tøkniliga menningin seinastu nógvu árini, hevur eisini broytt mátan, sum vit ferðast á netinum. Nýggja heimasíðan er tí eisini betri egna til fartelefonir og teldlar. Sniðið er nýtt, men boðskapurin er tann sami, við góðum ráðum til eina trygga tilveru í ferðsluni. Nýggja heimasíðan varð løgd út í februar 2021.

### Royndarverkætlan við súkkluvenjingarbreytum

Seinnu árini hava vit sæð alt fleiri súkkla í ferðsluni. Tað er heilsugott, umhvørvisvinarligt og kann vera eitt gott alternativ til bilin.

Ráðið fyri Ferðslutrygd ynskir at stimbra súkkluførleikan við at betra um súkklufrálæru og harvið betra um ferðslutrygdina hjá súkklandi.

Í fyrstu atløgu eru tvær súkkluvenjingarbreytir útvegaðar og læntar einum skúla í Havn og einum frítíðarskúla í Vágum. Breytin kann brúkast inni, ella úti – alt eftir hvat veðrið loyvir. Og hon kann brúkast av vaksnum eins væl og av børnum. Súkklubreytin ger súkklaran betri at:

- halda javnvág við fráferð ella steðg.
- geva tekin uttan at skinkla.
- ætta seg uttan at skifta kós.
- stýra súkkluni í spentum støðum

Vónandi roynist verkætlanin væl og ætlanin hjá RFF er at bjóða kommunum at ogna sær eina, ella fleiri, súkkluvenjingarbreytir at brúka í nærumhvørvinum og harvið betra um súkkluførleikan hjá børnum og vaksnum. Kostnaðarstøðið verður væntandi ikki tungt fyri einstøku kommunurnar (uml. 15 tús fyri hvørja).



**Ferðslufrásagnir**
Í samstarvi við Betri hava vit í vár arbeitt við eini verkætlan, sum hevur fingið heitið 'Ferðslufrásagnir'. Í fyrstu atløgu er talan um tríggjar smáar filmar, har fólk fortelja persónligar søgur um ferðsluvanlukkur. Væntandi leggjast fleiri ferðslufrásagnir afturat.

Filmarnir fara í útgangsstøðinum at verða nýttir í undirvísingarhøpi – millum annað til ferðsludagar fyri 8. flokkunum.



## Framlítandi virksemi RFF

Yvirskipað verður framhaldandi arbeiðið hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd skipað við støði í 'Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar 2019-2027'.

Týdningarmesta stigið fyri framman er, at seta í verk skaðakanning av ferðsluvanlukkum í Føroyum og at betra um skipaða hagtalsskráseting. Hetta eru fremstu tilmælini í ferðslutrygdarætlanini og verða tey mett at vera týdningarmestu amboðini at náa málinum um 30% færri ferðsluóhapp við fólkaskaða í 2027, við støði í tølunum frá 2018.

Tilmælið um skaðakanning er ikki nýtt og øll londini kring okkum, hava langt síðani sett á stovn skipaðar kanningar av álvarsligum ferðsluvanlukkum. Mælt verður til at vit finna íblástur í íslendsku og donsku skipanini, og harvið finna eina samanseting av skaðakanning, sum hóskar til okkara samfelag. Saman við skipaðari skaðakanning verða betri hagtøl væntandi ein náturligur ágóði, umframt at tað kann sjónliggera hvussu verandi skrásetingar kunnu betrast.

Tað sum tó hevur avgerandi týdning fyri at hetta málið kann náast er, at okkara politikarar lofta tilmælinum og gera tað fyrireikandi arbeiðið, sum skal til, fyri at skaðakanningarskipan verður sett á stovn í Føroyum. Hesum vil RFF eisini arbeiða við.

Ráðið fyri Ferðslutrygd fer harumframt, við støði í dagførdu ferðslutrygdarætlanini, at arbeiða miðvíst við teimum tilmælum í ferðslutrygdarætlanini, sum RFF varar av – m.a. átøk, undirvísing og hugburðskanningar. Harumframt er ætlanin at byrja árligar kanningar av nýtslu av trygdarbelti og, í samstarvi við kommunurnar, at arbeiða víðari við at betra um súkkluførleikan við súkkluvenjingarbreytum.

Neyðugt er framhaldandi at virka fyri átøkum at betra um vanarnar í ferðsluni. Hetta í góðum stevi við aðrar partar, sum á hvønn sín hátt arbeiða fyri betri ferðslutrygd. Átøk mótvegis stóru skaðafaktorunum í ferðsluni (ferð, gáloysni og rúskoyring) halda sostatt fram, eins og afturvendandi tiltøkini mótvegis børnum og ungum.

*16. apríl 2021*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*